gult cyan magenta svart

Fólkaskúlin skal læra næmingar at seta spurningar

Verkætlanararbeiði krevur nógv av lærarum, og vit hava eisini fingið afturmeldingar frá lærarum, sum siga, at hetta er torført at gjøgnumføra, sigur Jenny Lydersen, undirvísingarleiðari á fólkaskúladeildini í Mentmálastýrinum

– Verkætlanararbeiði kann tykjast sum ein stórur biti hjá nógvum, men eg ivist ikki í, at næmingar verða meiri tilvitaðir um tað, teir gera. Teir fara at duga betur at seta sær mál, og tað speglast aftur seinni í lívinum, sigur Jenny Lydersen, undirvísingarleiðari í fólkaskúladeildini í Mentamálastýrinum

FÓLKASKÚLIN
Turið Kjølbro

Føroyski fólkaskúlin mennist alla tíðina, og støðugt størri krøv verða sett bæði lærarum og næmingum. Sum nakað nýtt er fólkaskúlin farin undir verkætlanararbeiði, har næmingar í framhaldsdeildini skriva verkætlanaruppgávur. Hetta er í tráð við nýggju fólkaskúlalógina, sum varð samtykt í 1997 og sum kom í gildi árið eftir. Í fjør heyst varð kunngerð gjørd, sum lýsir og setir nærri treytir til arbeiðið.

Endamálið við verkætlanarbeiðnum er at venja næmingar at arbeiða við tvørgreinaligum evnum og spurdómum, ið er eyðkenni fyri verkætlanararbeiði. Umframt er ásett, at næmingar í 9. og 10. flokki skulu gera verkætlanaruppgávu sum eftirmeting av tí verkætlanararbeiði, sum er gjørt øll árini.

– Í fólkaskúlalógini er samtykt eitt nýtt arbeiðslag í øllum flokkum og fyri allar lærugreinir, sigur Jenny Lydersen, undirvísingarleiðari í fólkaskúladeildini í Mentamálastýrinum.

Uppgávan, sum næmingarnir í 9. og 10. flokki skulu gera, skal metast við skrivligum ummæli og verða talmett, um næmingarnir ynskja tað.

– At næmingar gera verkætlanir krevur, at teir hugsa øðrvísi, síggja samanhangir, arbeiða sjálvstøðugt og gera sær egnar royndir. Í eini verkætlanin skalt tú loysa nakrar spurningar og fara djúpri inn í eitt ávíst evni. Og tað eru ymiskir mátar at gera tað uppá. Tað er ikki nóg mikið, at tú lesur tær til nøkur svar. Tú skalt sjálvur gera egnar royndir, annaðhvørt at tú spyrt teg fyri ella gert kanningar av ymsum slagi. Síðani skalt tú duga at samanfata tilfarið og gera egnar niðurstøður umframt at vera førur fyri at kjakast um evnið bæði í flokkinum og saman við øðrum. Er evnið til dømis oljuvinna, skulu lærugreinirnar vera amboðið hjá næminginum til at loysa uppgávuna.

– Lærarin vegleiðir og roynir at fáa næmingarnar at brúka tað, sum teir hava lært. Í teim yngstu flokkunum verða sjálvsagt einfaldar uppgávur, men tá ið næmingurin kemur upp í 9. flokk, krevst rættiliga nógv av honum.

Næmingarnir fáa fimm fylgjandi skúladagar at gera uppgávuna lidna og at fyrireika framløguna. Til framløguna kunnu onnur, t.d. foreldur, verða boðin við. Tað verður rættiliga nógv gjørt burturúr framløguni, sum telur stóran part av samlaða arbeiðinum og eftirmetingini. Mett verður bæði, hvussu næmingarnir duga at bera arbeiðið fram, og hvussu endaliga úrslitið samsvarar við uppgávuna, teir settu sær. Allar verkætlanaruppgávur skulu enda við einum ítøkiligum úrsliti.

– Slík verkætlanararbeiði eru vanlig í skúlum á hægri stigi, men á miðnámsskúlum arbeiða næmingarnir meiri einsamallir. Í fólkaskúlanum verður stórur dentur lagdur á samstarv. Næmingar kunnu arbeiða einsæris og í bólki. Tað mest vanliga er at arbeiða í bólki, einir tríggjar næmingar saman, sigur Jenny Lydersen.

Slóðbrótandi

At skriva tvørgreinaligar verkætlanir er rættiliga kollveltandi fyri føroyska fólkaskúlan.

– Hetta kann tykjast sum ein stórur biti hjá nógvum, men eg ivist ikki í, at næmingar verða meiri tilvitaðir um tað, teir gera. Tá ið teir fara undir eina uppgávu, duga teir betur at seta sær mál, og tað speglast so aftur í ymiskum, teir fara í holt við seinni í lívinum, til dømis hvørja útbúgving ella arbeiði teir velja sær. Tað er eisini umráðandi, at næmingar duga at seta spurningar við ymiskt, ið kemur upp í samfelagnum, og harvið taka lut í tí almanna kjakinum.

Um yngri skúlanæmingar eru førir fyri at seta slíkar spurningar, sigur Jenny Lydersen.

– Í teim yngru flokkunum lærir tú ymsu tættirnar í verkætlanararbeiði og at seta spurningar við viðurskifti. Tá ið tú so kemur í sætta til sjeynda flokk, ert tú førur fyri at arbeiða meiri sjálvstøðugt og seta spurningar við nógv viðurskifti í umhvørvi, arbeiði og lívinum sum heild. Verkætlanararbeiðið framskundar hesa lærutilgongdina. Umráðandi er eisini at læra, at tá ið tú tekur eina avgerð og setir hana í verk, so fær tað avleiðingar. Í grundini hava øll val avleiðingar.

Afturmeldingar

Longu tá ið nýggja fólkaskúlalógin varð samtykt fyri fýra árum síðani, byrjaðu lærarar kring landið at fyrireika seg til nýggju avbjóðingina. Nógvir lærarar hava verið á skeiði og tikið eftirútbúgving í verkætlanararbeiði og í at gera verkætlanaruppgávu. Og fleiri skúlar kring landið eru farnir undir verkætlanarbeiðið. Fyrstu uppgávurnar skulu vera inni í vár.

– Verkætlanararbeiði krevur nógv av lærarum, og vit hava eisini fingið afturmeldingar sum siga, at hetta er torført at gjøgnumføra. Spurdómsorðingin tykist at vera trupul, eisini at avmarka evnið. Tí samstundis sum næmingar skriva verkætlan, skulu teir eisini ígjøgnum eitt pensum. Tí krevur tað av lærananum, at hann samskipar skúlaárið rættiliga væl, sigur Jenny Lydersen at enda.

Stór krøv verða sett fólkaskúlaskipanini

Ungdómurin slapp framat

– Tað hevur verið stuttligt at sæð tey ungu veruliga spenna seg út á listarliga økinum, sigur Rakel Helmsdal, sum skipaði fyri tvørlistarligu stevnuni Ung í Føroyum 2001. Norðurlandahúsið var meira enn fullsett, tá tey ungu sýndu fram sunnudagin

UNGDÓMSSTEVNA
Stefan í Skorini

Myndatextur: Sjónleikararnir kýta seg í tí síðstu royndarsýningini áðrenn endabrestin. Fyrireikararnir vóru ógvuliga glaðir fyri at síggja, hvussu tey ungu veruliga sluppu at spenna seg út á listarliga økinum

Mynd: Jens Kr. Vang

Um vikuskifti hava 60 ungdómar verið í Norðurlandahúsinum í Havn og roynt síni listarligu evni á ymsum økjum.

Í heyst varð boðað frá, at Norðurlandahúsið fór at skipa fyri eini tvørlistarligari stevnu fyri ung millum 13 og 18 ár. Tey, sum ætlaðu sær við á hesa stevnu, skuldu senda eina umsókn inn til Norðurlandahúsið, ið síðani valdi nøkur út til at luttaka.

Stevnan varð skipað við fleiri ymiskum verkstøðum, har arbeitt var við einum ávísum evni innan listina.

Talan var um dansiverkstað, myndlistaverkstað, sjónleikaraverkstað, sjónvarps/videoverkstað, skriviverkstað, teldulistverkstað og tónleikaraverkstað.

Gott forum hjá ungum

Sum heild eru luttakararnir á einum máli um, at hetta er eitt gott forum hjá ungum listarfólki at sleppa at vísa síni evni fyri almenninginum. Fleiri av luttakarunum hava ongantíð havt ein slíkan møguleika áður.

Tað hevur tí avgjørt verið stórur saknur í, at einki skipað tiltak, sum bara er ætlað ungum, hevur verið í Føroyum fyrr.

Føroyingar hava verið á eini slíkari stevnu í Finnlandi fyri stuttum, men hetta er fyrstu ferð, hon er í Føroyum.

Fyrireikararnir av stevnuni eru ógvuliga væl nøgdir við vikuskiftið, meðan stevnan fór fram.

– Tað hevur verið ógvuliga stuttligt at sæð, hvussu tey ungu hava spent seg út á tí listarliga økinum. Tá tey komu her fríggjadagin, vóru øll meira ella minni smæðin og aftuhaldin. Tey tordu ikki ordiliga at halda seg framat, men so tá tey høvdu slept nervunum, hava tey ordiliga víst síni evni, sigur Rakel Helmsdal, sum hevur verið við at skipa fyri hesi stevnuni í hálvtannað ár.

Ætlanin er, at henda stevnan skal vera annaðhvørt ár í Føroyum, og nú tá tann fyrsta hevur hilnast so væl, eru fyrireikararnir kanska ikki bangnir fyri at fara undir tiltakið einaferð afturat.

Stuttligt men strævið

– Tað hevur ógvuliga stuttligt men samstundis ræðuliga strævið, heldur 15 ára gamli Sigmundur Høgnason í Dali, sum var við í sjónvarps/videoverkstaðnum, og hann heldur, at hetta tiltakið er vert at hava aftur.

Luttakararnir møttu fríggjadagin, og teir hava ongantíð verið heima við hús fram til sunnudagin. Sovið varð í B36- og HB-húsunum, og luttakararnir vórðu purraðir út klokkan hálvgum átta á morgni.

– Tað kemur meira burturúr, tá luttakararnir eru saman allatíðina, men fleiri vildu ógvuliga fegin sleppa heim, sigur Sigmundur.

Sigmundur kann er at kalla garvaður sjónleikari, og tí var hann við í bólkinum, sum gjørdi ein stuttfilm. Hetta var samstundis ein ræðufilmur, sum líkt-iskt nakað Urban Legend og øðrum ungdómsræðufilmum, sum hava verið ógvuliga væl dámdir seinastu árini.

Filmurin varð eisini væl móttikin av áskoðarunum í Norðulandahúsinum.

Lógvabrestir

Sunnudagin fingu luttakararnir høvi at sýna fram tað, tey høvdu arbeitt við um vikuskiftið. Nógv fólk høvdu leitað sær niðan í Norðurlandahúsið til framsýningina, og fleiri vóru noydd at sita í trappunum fyri at fáa sitiplass.

Framførslan eydnaðist sum heild væl, og lógvabrestirnir mundu ongan enda tikið. Framførslan var soleiðis skipað, at teir ymsu verkstaðirnir sýndu fram hvør eftir annan.

Fólk livdu við í framførslunum, og serliga fekk tónleikabólkurin gongd í fjøldina.

Føroyingar í Sveis

Einki skipað føroyingafelag er í Sveis, men føroyingarnir eru tó nú so nógvir í tali, at teir hava skipað fyri samkomu millum føroyingar, sum búleikast í lítla fjallalandinum, og makum teirra.

Á myndini eru ellivu føroyingar, sum búgva í Sveis, meðan restin er teirra makar. Tað eru nýggju konufólk og tvey mannfólk.

Frá vinstru eru tey Rúni, Fróði, Ellen, Ingeborg, Bjørg, Jonna, Birna, Jóna. Aftanfyri standa Rosa, Hanna og Judith.

Tað er Judith Ochsner-Olsen, fødd og uppvaksin á Argjum, sum hevur sent okkum myndina. Hon sigur, at hon hevur búð í Sveis í fjøruti ár, og ikki fyrr enn nú hevur hon fingið at vita, at Jonna og Ingeborg hava búð í landinum líka leingi.

Tveir føroyingar vanta á myndini, men annars veit Judith ikki um fleiri føroyingar í Sveis.

Skíferð
10 - 18 mars 2001

10.mars 2001 skipar MB-Tours fyri skíferð við flogfari til Avoriaz í Fraklandi. Komi verður aftur til Føroyar 18.mars.

Kostnaðurin er einans

7295,-

Skíðir og liftkort er íroknað prísinum.

Tilmeldingarfreistin er 15. feb. 2001

MB-Tours
Bryggjubakki 2 · P.O. Box 3021 · FO-110 Tórshavn
Tel +298 32 21 21 · Fax +298 31 44 53
mb-tours@mb-tours.com · www.mb-tours.com

www.rgroz.com